## 7. partur. Dinnafía og Jógvan Sofus:

# Elsa gloymdi ikki dreingin, hon misti við »Kristinu« í 1920


*Axel Sivertsen, skipari*

**Nú er vit komin til seinasta part í røðini við frásøgnum hjá Jógvan Sofusi og Dinnufíu Ferjá. Hesa ferð greiðir Jógvan Sofus meira frá um útróður og um fiska-turking við Gjógv. Dinnafía greiðir frá tí, hon minnist um ta syrgiligu vanlukkuna, tá ið Kristina gekk burtur í 1920 og um mammu Dánjal Klein, har børnini gingu at lesa**


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo


*Hesir menn eru helst av Vágoynni, sum Axel førdi beint áðrenn Kristinu. Myndin hevur áhuga fyri hesa grein, tí fleiri av manningini á "Kristinu" eru við á henni. Menninir á myndini eru: Aftara rað frá vinstru: 1. Rasmus Nysted, Norðskála, 2. Jens Klæmint Danielsen, Svínoy, 3. Marius Hansen, Árnafirði 4 og 5 ókendir 7. Johannes Danielsen, Svínoy og 7 ókendur. Fremra rað: 1. Sofus á Sagbonki og 2. bróðir hansara Mikkjal Pauli (Palli) Eliasen, báðir av Kirkju 3. Axel Sivertsen, skipari, 4. Andreas Johannesen, Gjógv og 5. Edmund Nysted, Norðskála*
*Fylgjandi seks av hesum monnum fórust við Kristinu: Rasmus Nysted, 22 ár, Jens Klæmint Danielsen, 20, Johannes Danielsen, 18, Axel Sivertsen, 25, Andrias Johannesen, 15, og Edmund Nysted, 17*

Ein vanlukka, sum rakti Gjógv sera meint, var, tá ið Kristina gekk burtur í 1920 við 17 monnum. Seks av teimum vóru frá Gjógv. Petur J. Sigvardsen greiðir meira frá hesi vanlukku í síni Gjáarsøgu.

FF-blaðið hevði í 2004 hevði eina samrøðu við Andrew Godtfred, sum var sonur Dias á Heyggi, sum var kendur skipari og reiðarí í Vági. Vit fara her at endurtaka tað, sum Andrew greiddi frá um Kristinu:

*Í 1913 keypti pápi sjálvur skip, ið hann nevndi Kristina eftir konuni. Hann fór eftir skipinum sama dag, sum eg var føddur. Hann hevði leigað ein Garðabát at fara til Íslands við manningini.*

*Kristina var nógv besta skipið í Føroyum øll árini pápi hevði hana, og hon fiskaði betur og betur fyri hvørt ár, sum gekk. Í 1915 fekk hon 850 skippund, í 1916 fekk hon 950 skippund og í 1918 fekk hon 1050 skippund. Hetta var eisini umtalað í bløðunum. Í 1918 skrivaði Suðuroyablaðið Føroyatíðindini m.a.:*

*»Den energiske kaptajn Godtfred, hvem et ... Held har fulgt i mange Aar, og hans dygtige Mandskab, har efter hvad der forlyder, efterlignet Franskmændenes Fangsmaade, idet de ikke blot nøjes med Bundfiskeriet, men forstaar at finde Fisken paa Forskellige Dybder, en Fremgangsmaade, der giver forbavsende Resultatet paa ganske kort Tid.«*

*Spurt verður í blaðnum, hvør ið mundi fara at sláa metið hjá Kristinu. Kanska fór tað at vera "Kristina" sjálv! Og rætt var, tí í 1919 fingu teir 1455 skippund.*

*Seinni keypti Kjølbro "Kristinu" saman við Axel Sivertsen, men hon gekk burtur árið eftir. Eg havi hoyrt, at Kjølbro mundi farið av knóranum tá, tí hon var ikki tryggjað.*

Teir fóru avstað 21. februar 1920, og um hesa tíðina var rættuligt illveður, men teir eru kortini helst komnir til Íslands í øllum góðum. Men tann 28. februar brast hann á við einum slíkum ódnarveðri, sum eingin tá visti makan til, og sum eisini merktist við Gjógv. Tað frættist einki aftur frá skipinum, uttan nakrar leysasøgur um, at skipið var sætt av ymsum, men hetta gjørdi bert ilt verri. Samstundis hvarv Helena við 16 monnum. Í juni hvørvur Karin við 13 monnum. Av teimum átta, sum vóru við Puritan, doyðu teir seks. Tilsamans fórust 62 mans á sjónum í 1920, sum man vera eitt tað størsta feigdarár hjá føroyingum.

### Dinnafía minnist summar av manningini

Tá var eg knappliga trý ára gomul, so tað er ikki tað nógva, eg kann minnast frá hesum. Men kortini minnist eg, at á jólum 1919, sum Kristina fór avstað í februar, at menn frá Norðskála høvdu verið við Gjógv og dansað. Mamma og tey í Jákupsstovu áttu so nógva slekt har. Axel Sivertsen, skiparin á Kristinu, var gjáarmaður. Hann var uppvaksin í Svínáum hjá ommusystur síni. Mamma hansara doyði, tá ið hann var tríggjar vikur gamal. Hon var systir abba í Jákupsstovu og var ikki meira enn 25 ár, tá ið hon doyði. Hon æt Katrina, kallað Trina, og var gift við Petur Jakku á Fløtti. Omman á Fløtti tók Kristian, men Axel vaks upp í Svínáum hjá Elsu, sum var systir Katrinu, langommu í Svínáum. Hon var ommusystir Axel, og hon tók hann sum nýføðing. Hon átti fleiri børn, eisini børn sum vóru eldri. So giftist ein dóttir Elsu út til Fugloyar. Hon hevði Axel við sær. Tá hevur hann verið eini sjey ár. Tey kallaðu hann Axel á Stræti, sum var húsanavn á Kirkju. Hann bleiv forlovaður í Klaksvík við eini dóttur Jákup á Biskupstøð, sum æt Elsa. Tey høvdu grundað í Klaksvík.

Hann var ein ungur skipari. Í 1917 førdi hann, 22 ára gamal, Elsu hjá Niels J. Mortensen av Tvøroyri. Elsa varð niðurskotin á bankanum av týskum kavbáti 23.mai hetta ár.

Ein hálvbeiggi Axel, Jákup Martin, var við skipinum. Jákup Martin var bert 17 ára gamal. Øll manningin fór í bátin, tá ið teir sóu kavbátin, og teir fingu boð um at rógva yvir til hann. Skiparin og fýra av manningini fingu boð um at koma umborð í kavbátin, meðan hinir róðu aftur til skipið við týskarum, sum løgdu spreingievni í skipið. Ein av teimum, sum fóru umborð á kavbátin, var Jákup Martin, og týskarar høvdu verið so blíðir við henda unga dreingin, at teir